# Seinasti møguleikin at vinna heiður í ár

**Bæði hjá StÍF og H71 er steypakappingin allarhelst seinasti møguleiki at tryggja felagnum nakran heiður í hesum kappingarárinum**

STÍF-H71
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Strandingarnir hava bestu kortini á hondini. Teir vunnu fyrru hálvfinaluna í Hoyvík við einum máli, og harumframt má sigast, at teir hava sálarligu yvirvágina móti H71, tí teir hava vunnið tvær ferðir á teimum innan fyri stutta tíð.

### Mótbrekka hjá hoyvíkingum

Hjá H71 hevur tað gingið ógvuliga striltið seinastu vikurnar. Eftir ein serstakliga góða byrjan upp á kappingarárið, hevur tað seinastu vikurnar verið talan um eina tunga mótbrekku hjá hoyvíkingunum. Hóast teir hava verið nær við at fáa stig til høldar, hevur tað so at siga hvørja ferð kiksað í seinastu løtu, og tá kann tað verða tungt at fáa menn upp aftur við høvdunum.



*Finalistarnir frá seinasta kappingarári verða helst ikki heilt frammi í oddinum í landskappingini, og tí er steypakappingin høvið, um gull skal fáast til høldar*

Júst hesi bæði liðini hittust í steypafinaluni í fjør, og tá vóru tað strandingar, ið drógu longra stráið og vunnu ein tryggan sigur. Liðið hjá StÍF er lítið broytt í mun til í fjør, og hava strandingar ein góðan dag, kunnu teir lættliga koppa øllum liðunum í Føroyum.

StÍF og H71 eru eisini tvey ógvuliga ymisk lið. Meðan hoyvíkingarnir eru stórir og vælvaksnir við nógvum stórum skjúttum, so sum Halgir Dahl Olesen, Piti Negru, Henrik Gerster og Niels Viggo Niclasen, so dúva strandingar meiri upp á sínar lágvaksnu og fótfimu menn. Tað hevur altíð verið eitt eyðkenni fyri strandingar, at teir hava spælt skjótan hondbólt, og fáa teir gongd á skjótálopini hjá sær, eru teir truplir at steðga.

Ein dystur millum StÍF og H71 leggur eisini upp til ein dyst millum nakrar av bestu málverjunum í landinum. Marian í málinum hjá StÍF er óivað besti málverji í landinum, meðan bæði Levi Nybo og Jens Skipagøta eru millum teir allarbestu føroysku málverjarnar.

StÍF noyðist nokk at átaka sær favoritleiklutin, men hoyvíkingar verða óivað uppsettir upp á at fáa okkurt gott burtur úr steypakappingini, nú teirra leiklutur í landskappingini tykist verða avgreiddur.

## Dystaryvirlit 26.01.05

**Coca-Cola kappingin**
**Seinnu hálvfinalurnar:**

**26.01.05 Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 26.01 | Neistin – Søljan | 19.00 | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |
| 27.01 | Stjørnan – VB | 19.30 | Kristjan Johansen & Sámal Hansen |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25.01 | StÍF – H71 | 20.00 | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 26.01 | VÍF – Kyndil | 20.00 | Kristjan Joensen & Karstin Joensen |

# Púra opið í Vestmanna

**Talan verður óivað um eina stúgvandi fulla høll í Vestmanna í kvøld, tá ið VÍF og Kyndil bresta saman í seinnu hálvfinaluni**

VÍF-KYNDIL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt er upp til eitt ordans brak av einari hálvfinalu, tá ið arvafíggindarnir báðir og risarnir i føroyskum manshondbólti, VÍF og Kyndil, í kvøld skulu gera av, hvat av liðunum skal verða við í steypafinaluni, sum verður 5. februar.



*Bert eitt mál er á muni undan seinnu hálvfinaluni millum Kyndil og VÍF. Hvørki teirra hevur staðið við steypinum seinastu trý árini, og tað munnu báðir partar ætla sær at broyta*

### Vestmenningar lítlan fyrimun

Tann fyrra hálvfinalan í Havn endaði við einum teprum sigri til VÍF upp á eitt mál, og tí hava teir ein evarska lítlan fyrimun í kvøld, men hann er einki at tosa um.

Vestmenningarnir eru óivað ógvuliga uppsettir upp á at vísa sínum viðhaldsfólkum, at ósigurin fyri KÍF sunnudagin var ein svipsari, og tað er einki at ivast í, at um VÍF í kvøld vinnur sær pláss í steypafinaluni, so fara áskoðararnir at fyrigeva teimum ósigurin móti KÍF.

Hinvegin er spurningurin eisini, hvørja ávirkan tað hevur á moralin hjá VÍF, at teir taptu greitt sunnudagin. Verður tað ein eyka motivatiónsfaktorur hjá teimum, ella verður tað hinvegin ein bági, sum fer at geva teimum eitt sindur fleiri nervar undan dystinum í kvøld. Tað er ein styrkur fyri vestmenningar, at bæði Eli Müller og Daniel Rapa nú eru aftur á liðnum, eftir at teir báðir tveir hava verið uttan fyri í drúgva tíð við skaða.

Kyndlaliðið tykist verða væl fyri í løtuni. Gamaní stóð tað nógv á hjá teimum, áðrenn teir fyri góðari viku síðani fingu tryggjað sær bæði stigini móti KÍF, men sunnudagin vunnu teir ein tryggan sigur á H71, sum teir annars mangan áður hava havt stórar trupulleikar av.

Í fyrru hálvfinaluni vóru hvørki Janus Einar Sørensen ella Høgni Klein við hjá Kyndli, men teir verða báðir við í kvøld, og teir styrkja munandi um liðið hjá havnarmonnunum. Janus Einar var leikbannaður í tí dystinum, meðan Høgni hevur verið skaddur í eitt styttri tíðarskeið, og hóast hann ikki er heilt frískur í fótinum enn, so verður hann við í kvøld. Sunnudagin var hann við eina løtu móti hoyvíkingum, og tá fekk hann fimm mál.

# Pool-kapping í Gøtu



Ein av teimum kappingum, sum stava frá billardítróttini, er pool, sum er tann meira amerikanska útgávan av spælinum.

Borð til endamálið hava í nøkur ár verið at sæð ymsastaðni kring landið, men sjáldan er talan um almennar kappingar í hesum.

Um vikuskiftið var tó ein slík hildin í Syðrugøtu. Her eydnaðist Helga L. Petersen, sum eisini er kendur frá øðrum bóltspølum, at vinna kappingina framman fyri Rúna Klein Joensen. Hanus Jacobsen gjørdist nummar trý.

Í alt vóru 43 luttakarar í kappingini, so illa kann sigast annað enn, at talan er um eina væl umtókta ítróttargrein.